

*Hergeir Nielsen, løgtingsformaður sigur kortanei til útseting av tingmálum vegna jarðarferð, um tað ikki snýr seg um nærmastu familju*

# Laga seg ikki eftir jarðarferðum

**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður heldur tað vera langt uti, at løgtingsformaðurin ikki vildi útseta ein fyrispurning, tá ið spyrjari, svarari og næstformaðurin vóru samdir í at útseta fyrispurningin, tí svararin skuldi fylgja. Tað ber ikki til at geva undantaksloyvi, sigur Hergeir Nilsen, løgtingsformaður**

Randi Jacobsen

Á dagskránni fyri tingfundin týsdagin stóð ein skrivligur fyrispurningur frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni. Fyrispurningurin var um lønirnar hjá leiðslu og stjórum í almennum fyritøkum.

Hesin fyrispurningur fekk eina óvanliga lagnu.

- Mánakvøldið ringdi Johan Dahl til mín og segði, at hann fór burtur í nakrar dagar, og týsdagin noyddist hann tí í kapellið í Klaksvík at fylgja eini skyldkonu hjá konuni. Hann spurdi tí, um ikki bar til at útseta fyrispurningin, sigur Kári P. Højgaard.

### Jógvan segði ja

Tað helt hann vera í fínasta lagi, tí eftir hansara tykki er jarðarferð lógligt forfall, og tað hevur altíð verið siðvenja at laga seg, tá ið fólk skulu at fylgja.

Johan Dahl greiddi Jógvan á Lakjuni, sum tá sat í løgtingsformanssessinum frá hesum, og hann góðtók tað.

Síðan fór Johan Dahl av fundinum.

- Eg fór so at siga løgtingsformanninum Hergeir Nielsen frá, at vit høvdu avtalað at útseta fyrispurningin, men hann svaraði stutt og greitt, at spurningurin skuldi svarast, tí fyrispurningurin stóð á dagsskránni, og hann bað meg lesa fyrispurningin. Tað sá eg onga orsøk vera til og fór av røðarapallinum, sigur Kári P. Højgaard.

- Eg haldi tað vera undir alt lágmark, at atlit ikki kundu takast til, at landsstýrismaðurin fór at fylgja, sigur Kári P. Højgaard.

### Hergeir stendur við sítt

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður heldur seg hava tikið røttu avgerðina.

- Í seinastu tingsetu kom ein nýggj regla um, at fyrispurningar skuldu svarast, tá ið tær vóru komnir á dagsskránna. Hetta kom av, at næstan hvørja ferð varð biðið um undantaksloyvi, sigur Hergeir Nielsen.

Hann heldur, at í hesum førinum var tað eingin ólukka, at landstýrismaðurin ikki var til staðar. Bæði spurningur og svar vóru skrivlig, og tingið misti bara orðaskiftið. Annars kann løgtingsmaðurin altíð spyrja av nýggjum, sigur hann.

Hergeir Nielsen heldur ikki, at lansstýrisfólk hava misbrúkt jarðarferðir fyri at biðja um útseting, men jarðarferðirnar eru nógvar, tingfólk og landsstýrisfólk kenna nógv fólk, og skal tað biðjast um útseting, hvørja ferð ein jarðarferð er, kemur alt upp í røkur. Hevi tað verið nær familja at fylgt, hevði støðan verið øðrvísi, heldur Herheir Nielsen.

Hann heldur tað vera keðiligt, at Jógvan á Lakjuni sum varatingformaður játtaði at útseta fyrispurningin.

### Eg havi ábyrgdina

- Hinvegin vita bæði Kári P. Højgaard og Johan Dahl, at eg eri tingformaður við evstu ábyrgdini. Vit mugu hava fastar mannagongdir. Í næstseinastu viku varð biðið um útseting, tí ein landsstýrismaður skuldi á fund. Eg segði nei til útseting, og so kom landstýrismaðurin, sum skuldi svara, kortini á fund, sigur Hergeir Nielsen.

---

# Fyrireika seg til verkfall

**Fiskavirkini í Suðuroy verða beinanvegin rakt, um Smyril verður lagdur vegna verkfall**

Randi Jacobsen

Í løtuni er tað bara á Delta á Tvøroyri, at nakað av fiskaarbeiði er í Suðuroyni. Fiskavirking í Vági hevur ikki keypt nakran fisk seinastu vikurnar, og tí liggur virkið stilt.

Enn er eingin útmelding komin frá fakfeløgunum, um tey fara at geva undantaksloyvi til Smyril, skuldu semingsroyndin slitnað. Feløgini sita í seming í dag og eru tí ikki at hitta.

Ein partur av manninginí á Smyrli er limur í Starvsmannafelagnum.

Magnus Jespersen, stjóri í Delta sigur, at enn eru tey ikki farin at fyrireika seg til eitt møgligt verkfall, men tað verður helst gjørt.

Tað einasta, sum virkið kann gera, er at leggja pakkning og salt inn undir seg.

Verður verkfall, fær Delta ongan fisk norðaneftir og kann tí bara keypa frá bátunum í oynni.

- Men verður verkfall, steðgar arbeiðið upp næstan beinanvegin, tí vit leppa ikki av við lidnu vøruna, sigur Magnus Jespersen, sum hevur eitt hjartasuff:

-Hvat varð av politisku lyftunum um, at Smyril ikki aftur skal leggjast orsakað av verkfalli?